einki at betýða, sigur 99 ára gamli maðurin.

### Rabarbu-súltutoy

Dagurin hjá Eliesari hevur stórt sæð eina fasta rútmu.

Hann fer upp, og fær sær fyrst av øllum eina skál av havragreyti og seinni eisini eina fransbreyðflís við súltutoy á. Serliga væl dámar honum rabarbu-súltutoy.

Tá komið er nakað út á fyrrapartin setur hann seg í stólin við vindeygað. Og ikki leingi aftaná kemur so heimahjálpin á gátt.

Síðani skal døgurðin kókast og ein væl uppiborin døgurðaslangur stendur fyri framman.

– Um seinnapartarnar plagi eg bara at hygga mær, sigur hann.

### – So gangi eg bara

Hóast hann er komin høgt til aldurs, so er hann kortini lættur á beinunum.

Er veðrið til vildar, er ikki óvanligt at síggja Eliesar fara út fyri dyr, og ganga sær ein túr inn eftir og inn á Shell-støðina, har hann plagar at keypa okkurt.

– Hetta er bara smákeyp, tí eg orki ikki so væl at bera stór og tung ting heim til hús. Tað kann t.d. vera ein mjólkarpakki ella okkurt tílíkt.

– At ganga inn hagar og útaftur, er ein passaligur túrur fyri meg, sigur hann.

Júst hetta við at ganga túrar, er ikki ókent fyri Eliesar. Sum greitt er frá í hinari greinini, so er hann ein trúfastur møtigangari í Betesda.

Vanliga plagar ein maður, ið býr nakað norðari at taka hann við á møtini, ella at sonurin ringir og spyr um hann hevur fingið fart.

– Men er eingin bilur, tja, so gangi eg bara til møtið, sigur Eliesar.





*Eliesar vildi fegin kunnað lisið í Bíbliuni, men sjónin forðar honum í hesum. Ístaðin er bandupptakarin eitt heppið amboð í so máta: Ein partur av Bíbliuni er lisin inn á band, og at lurta eftir teimum er til stóra gleði og uppmuntring fyri henda gamla trúgvandi mannin*

*Mynd: Bárður*

# Gamli maðurin og orðið

**– Harrin er hirði mín, tí havi eg onga orsøk at óttast, sigur Eliesar, sum kom til trúgv á Jesus fyri 76 árum síðani**

ELSTUR
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** – Eg eri ongatíð einsamallur, tí Harrin er altíð hjá mær!

Tað er ikki neyðugt at sita leingi inni hjá Eliesari, fyrrenn tú skilir, hvat hesin maður hevur sett álit sítt á, bæði í lívi og handan deyða.

Á vegginum hongur "Ráðgevarin", á borðinum liggur Bíblian, eins og har liggja ymisk andalig skrift. Og so eitt útvarpstól við bandavspælara.

– Tað er ikki tí, eg lurti ikki nógv eftir útvarpinum. Men eg brúki bandupptakarin nógv, tá eg skal lurta eftir Bíbliuni, sigur Eliesar.

Hann er so mikið sjónveikur, at hann kann ikki lesa í Bíbliuni, hóast hann so fegin vildi. Tí eru andaligu bondini ein stór troyst og hjálp hjá honum: Onkur hevur nevniliga lisið partar av Bíbliuni inn á bond, soleiðis at Eliesar, og onnur í somu støðu sum hann, kann fáa andaliga føði tann vegin.

– Hygg her. Lurta nú!, sigur hann.

### Ljósið og samfelagið

Við fingrunum finnur hann á play, og ein myndig mansrødd byrjar at lesa klárt og týðiligt: - Vit lesa nú úr fyrsta brævi Jóhannesar. Kapittul 1 og frá vers 1.

Eliesar setur seg væl aftur á í stólin, hann faldar hendurnar saman og lurtar við andakt. Hetta eru væl kend ørindi fyri hann, um at ganga í ljósinum og um at hava samfelag við Harran.

Maðurin á bandinum lesur nøkur vers, og Eliesar lurtar framvegis, uttan nakra minu. Nú byrjar hann, fyrst varliga at flyta varrarnar við somu orðum sum upplesarin, og tá hann er komin nøkur ørindi út í henda fyrsta kapittulin lesa teir báðir í takt.

Hetta er ikki bara ein vanlig ramsa fyri hann, men hetta er nakað sum hann kennir, nakað sum hann hevur sannað í lívi sínum, og nakað sum kemur beina leið úr hjartanum.

"Játta vit syndir okkara, er Hann trúfastur og rættvísur, so Hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi", ljóðar úr bandupptakaranum.

– Ja, soleiðis er tað. Har er hvørt orð satt, sigur Eliesar.

### Til minnis um seg

Sunnudagurin er fyri Eliesar ein serstakur dagur, sum hjá so mongum øðrum trúgvandi fólki.

Dagurin byrjar við morgunmøtinum í Betesda - hetta møtið, sum Eliesar heldur vera tað besta møtið av teimum øllum.

Serliga væl dámar honum breyðbrótingina, har hann og øll hini á møtinum fáa loyvi til at minnast Jesu verk á ein serstakan hátt.

– Hann segði jú við okkum, at vit skuldu gera hetta til minnis um seg. Og tað gleðist eg um, sigur hann.

Tá bønarmøti er mánakvøld er Eliesar altíð við, og tað sama á uppbyggingarmøtinum mikukvøld.

Men aftur til sunnudagin.

### Sjónvarpið

Inni í sovikamarinum hevur hann nevniliga eitt tól aftrat, - sjónvarpstólið. Hann plagar at hyggja eftir tíðindasendingini, men sunnudag kl. 4 er hann fastur framman fyri sjónvarpið.

Tá er ein andalig sending á skránni - annaðhvørt upptøkur frá onkrum møti ella frá onkrari gudstænastu. Hetta er eisini ein góð løta fyri Eliesar.

Henda sendingin varir í ein tíma ella so, og tá fer hesin 99 ára gamli maðurin at gera seg kláran til tað næsta andaliga tiltakið: Kvøldmøtið í Betesda.

Hetta møtið varir vanliga í hálvanannan tíma, og hóskar hetta seg sera væl inn á skránna hjá hesum kvika gamla manninum.

Hann má náa heim, og fáa sær ein náttúrðabita, áðrenn klokkan gerst 19:50.

### Ein andakt við andakt

Kl. 19:50 kemur nevniliga enn ein sending, sum er millum favorittar hansara: Andaktin í sjónvarpinum.

– Tað plagar vanliga at passa so øgiliga væl, at eg eri akkurát liðugur við náttúrðan, tá andaktin byrjar, sigur hann.

Tað er ikki altíð at Eliesar kennir tey, sum hava andaktina. Men fyri hann hevur tað ikki so stóran týdning. Tað týdningarmesta er at fáa boðskapin um Jesus fram.

Og Eliesar lurtar altíð við andakt og við áhuga eftir andaktini.

– Eg veit ikki, hvør tað var sum hevur havt tvær tær seinastu andaktirnar. Men eg haldi, at tað var sera gott tað, sum hann segði.

– (Vit hava síðani fingið uppspurt í Sjónvarpi Føroya, at hann, ið hevði hesar andaktirnar sunnukvøldini 15. og 22. mai, var bygdarmaður hansara, Egil Joensen úr Klaksvík).

– Jú, jú. Tað var rætt sum hann segði, sigur hann.

### Rørdir

Vit hava sitið eina góða løtu inni hjá Eliesari, og nú er tíðin komin at fara víðari. Vit siga farvæl, og ynskja honum ein góðan dag við gomlu føroysku heilsanini: Jesus fylgi tær.

Men Eliesar vil fegin hava eitt orð inn aftrat - eina serstaka til heilsan til okkum báðar frá tíðindatænastuni.

Hann fer á føtur, stillar seg mitt á gólvið, faldar hendurnar og fer at syngja ein vakran sálm í tveimum ørindum um tað at hava álit á Harran. Vit gerast báðir rørdir av vakra sanginum - so rørdir at vit ikki fingu navnið á sanginum við.

– Havið tað gott, tit báðir. Og takk fyri í dag, sigur Eliesar.

Tað var ikki hann, sum skuldi takka, men vit báðir. Vit, sum hava verið saman við einum manni, sum, at síggja til, kann sita einsamallur í einum stóli í køkinum. Men sum hinvegin ongatíð følir seg einsamallan, tí Harrin er honum so nær.

## Gunvá setir og handar

Forkvinnan í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar kommunu sleppur bæði at seta Norðoyastevnuna og handa heiðursmerki eftir kappróðurin.

Klokkan 19.30 fríggjakvøldið verður Norðoyastevnan sett í Vágstúni, og har fer Gunvá við Keldu at flyta fram røðu. Klaksvíkar hornorkestur spælir til tiltakið.

Norðoyastevnudag kl. 15.00 verður fyrstu FM-kappróðurin í ár hildin á vágni í Klaksvík, og eftir róðurin fer Gunvá við Keldu at handa heiðursmerki til teir vinnandi bátarnar.

## Borgarstjóri á fólkafundi

Norðoyastevnudag verður tann vanligi fólkafundurin við skrúðgongu, og tá fer borgarstjórin í Klaksvík at halda røðu.

Skrúðgongan við Klaksvíkar Hornorkestri, skótum, ítróttarfólkum og hestum fer úr Klaksvíkargarðinum kl. 14.00, og gingið verður heim í Vágstún, har Steinbjørn O. Jacobsen flytir fram røðu. Í Vágstúni fer Klaksvíkar Hornorkestur eisini at spæla.

## Stjóri heldur røðu

Norðoyastevnuaftan verður vanliga midnáttarsamkoman, tá hundraðtals fólk savnast í Vágstúni til felagssang, røðu, tónleik og fýrverk. Hetta er tað tiltakið á Norðoyastevnu, sum savnar flest fólk.

Tiltakið byrjar við kyndlagongd í Vágstúni, og so fer stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, at flyta fram røðu. Aftan á verður fýrverk og felagssangur.

## Trøllini flippa út

Norðoyastevnudag kl. 16.00 verður stórt barnatiltak í KÍ-høllini. Tá fara Trølla Pætur, Trølla Omman og onnur at undirhalda børnunum við tónleiki, skemti og dansi. Tað plagar at verða lív í, tá ið trøllini eru á ferð, og tað skuldi verið undarligt, um ikki garvilla Trølla Omman ikki fær alt upp at kóka.